NORÐOYA SPARIKASSI

# Ársfrásøgn 2011

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Saltangará:
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. 475000
Fax 476012

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | 4 |
| ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA | 5 |
| LEIÐSLUFRÁGREIÐING | 6 |
| ROKNSKAPARFRÁGREIÐING | 7 |
| VÁÐAR OG VÁÐASTÝRING | 11 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR | 15 |
| FÍGGJARSTØÐA - OGN | 16 |
| FÍGGJARSTØÐA - SKULD | 17 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | 18 |
| YVIRLIT YVIR NOTUR | 19 |
| NOTUR - SOLVENSUPPGERÐ | 20 |
| NOTUR - NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 21 |
| NOTUR - 5 ÁRA YVIRLIT | 28 |
| NOTUR | 29 |
| NEVND OG STJÓRN | 40 |
| UMBOÐSRÁÐ | 42 |

# Leiðsluátekning

Vit hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2011 fyri Norðoya Sparikassa.

Ársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu við ársenda og úrslitinum fyri 2011.

Somuleiðis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rætta frágreiðing um gongdina í virksemi sparikassans og fíggjarligu støðu, umframt eina frágreiðing av teimum mest týdningarmiklu váðum og óvissum, ið sparikassin kann verða ávirkaður av.

Ársfrásøgnin verður viðmælt aðalfundinum at góðkenna.

Klaksvík, 13. apríl 2012

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>formaður | Jóannes Hansen<br>næstformaður | Erling Petersen |
| Jóhanna á Tjaldrafløtti | Kristian Martin Rasmussen | Karl Heri Joensen |
| Julianna Thomsen | Guðrið Lava Olsen | Eyðun Nolsøe |

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til umboðsráðslimirnar í Norðoya Sparikassa

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2011 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum, herundir nýttum roknskaparhátti fyri sparikassan. Ársroknskapurin er gjørdur sambært lóg um fíggjarligt virksemi, herundir kunngerðir um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi og kunngerðir um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar. Leiðslan hevur somuleiðis ábyrgd av tí innanhýsis eftirliti, sum leiðslan metir neyðugt, til tess at ein ársroknskapur kann gerast, uttan skeivleikar av týdningi og uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað í samsvari við altjóða grannskoðaravegleiðingar fyri grannskoðan og onnur krøv sambært galdandi grannskoðaralóggávu. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiðið, ið skal til, fyri at fáa grannskoðaraprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið er neyðugt, fyri at stovnurin kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um góðskuna á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin umfatar eisini støðutakan til, um roknskaparhátturin, ið leiðslan hevur nýtt, er hóskandi, um roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og eina heildarmetan av samlaðu ársfrásøgnini.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðaraprógv, sum er hóskandi grundarlag fyri niðurstøðu okkara.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum sparikassans tann 31. desember 2011, umframt úrsliti av sparikassans virksemi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2011 í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir kunngerðir um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar.

## Útsøgn um leiðslufrágreiðingina

Vit hava, samsvarandi lóg um fíggjarligt virksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki framt onnur stig afturat tí framdu grannskoðanini av ársroknskapinum.

Tað er við grundarlagi í hesum okkara fatan, at upplýsingarnir í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Nykøbing Mors, 13. apríl 2012

BDO
Statsautoriseret revisionsaktieselskab

Jens Peter Egebjerg Hansen
Statsautoriseret revisor

Klaksvík, 13. apríl 2012

Numero Sp/f
Løggilt grannskoðaravirki

Símun Absalonsen
Løggildur grannskoðari

# Leiðslufrágreiðing

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til bæði privat og vinnurekandi viðskiftafólk um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og hartil eina holla, professionella ráðgeving.

## Óvissur í samband við virðisáseting

Størstu óvissurnar í samband við virðisásetingar eru knýttar at niðurskrivingum av útlánum, burturleggingum upp á ábyrgdir, avsetingum móti skyldum og virðisáseting av yvirtiknum ognum. Á hesum økjum arbeiðir sparikassin støðugt við at betra og menna nýggjar arbeiðshættir til hesar virðisásetingar, og metir sparikassin, at óvissan er á einum støði, sum ikki hevur stóran týdning í sambandi við roknskapin.

## Óvanlig viðurskifti

Í 2010 tók sparikassin av møguleikanum at lána 650 mió. kr. við individuellum statsveðhaldi. Lánið fellur til gjaldingar í seinasta lagi 28. juni 2013.

Sambært gjaldsførisætlan sparikassans skuldi lánið afturrindast við 200 mió. kr. í 2011. Men av tí, at sparikassin hevur havt gott gjaldføri í 2011, hevur sparikassin valt at niðurgjalda lánið við 300 mió. kr. ella 100 mió. kr. meira enn ætlað. Við árslok er lánið sostatt komið niður á 350 mió. kr.

Í sambandi við at sparikassin fyri nøkrum árum síðan veitti fastrentaða lánifígging, hevur sparikassin gjørt nýtslu av fíggjarligum tólum í sambandi við roknskaparliga trygging av hesum rentuváða. Sparikassin staðfestir, at fallandi marknaðarrentan hevur ført til, at hesi tól við ársenda høvdu eitt negativt marknaðarvirði upp á tilsamans 10,6 mió. kr. Sparikassin hevur somuleiðis staðfest í 2011, at hesi fíggjarligu tól ikki lúka treytirnar fyri roknskaparliga trygging sambært kunngerð um fíggjarliga rapportering, og hevur tí valt at broyta roknskapin. Broytingarnar bera í sær, at øll skyldan nú verður avsett í roknskapinum. Broytingin í marknaðarvirðinum fyri 2011 er uppgjørd til 5,4 mió. kr. og er bókað sum virðisjavnan av fíggjarligum tólum. Restin, 5,2 mió. kr., viðvíkja undanfarnum árum og verður roknskapurin broyttur samsvarandi. So hvørt fíggjarligu tólini verða niðurskrivað, lækkar negativa virðið og sparikassin verður tá at afturføra hesar skyldur.

## Gongdin í 2011

Úrslitið áðrenn skatt í 2011 gjørdist eitt hall upp á 1,8 mió. kr., móti einum halli upp á 57,8 mió. kr. í 2010. Sparikassin er ikki nøgdur við úrslitið, men fegnast tó um framgongdina. Úrslitið er í høvuðsheitum merkt av lægri rakstrarkostnaði, negativari virðisjavnan og niðurskrivingum upp á útlán.

Roknskapurin fyri 1. hálvár 2011 vísti eitt avlop eftir skatt upp á 3,5 mió. kr., og væntaði sparikassin, at hendan gongdin fór at halda sær til ársenda. Men sparikassin staðfesti í seinna hálvári eitt hall upp á 5,3 mió. kr., orsakað av hægri niðurskrivingum og negativari virðisjavnan av fíggjarligum tólum.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum hevði sparikassin eitt avlop í 2011 upp á 11,9 mió. kr. móti 4,9 mió. kr. í 2010. Hetta er ein framgongd í vanliga rakstrinum upp á 7 mió. kr. Sparikassin væntar, at positiva gongdin í vanliga rakstrinum heldur fram í 2012.

Í ársfrásøgnini fyri 2010 metti sparikassin, at úrslit av vanligum rakstri, tá sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, fór at gerast eitt avlop upp á 15-20 mió. kr. Høvuðsorsøkin til at sparikassin ikki náddi hesum máli, var fallandi rentustøðið í seinna hálvári 2011, sum førdi við sær minni rentuinntøkur av lánum, sum eru rentað í mun til cibor. Fyri at bøta um hetta, hevur sparikassin í desember 2011 hækkað rentuískoytið upp á hesi lán við 0,5%-stigi.

# Roknskaparfrágreiðing

## Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar fullu úr 77 mió. kr. í 2010 niður í 72,1 mió. kr. í 2011, ella við 4,9 mió. kr., ið er ein minking upp á 6,4%.

Henda minking kemst serliga av minkandi útlánsvirksemi og fallandi rentustøði.

## Virðisjavnan

Virðisjavnanin vísir eitt hall í 2011 upp á 2,4 mió. kr. móti einum halli í 2010 upp á 13,4 mió. kr. Sparikassin hevur í 2011 havt ein vinning við sølu av óskrásettum partabrøvum upp á 4,4 mió. kr., men staðfestir samstundis hall orsakað av fallandi marknaðarvirði á fíggjarlingum tólum upp á 6,3 mió. kr.

Sparikassin hevur í 2011 selt óskrásett partabrøv og harvið minkað um henda váða við 19,6 mió. kr., úr 31 mió. kr. niður í 12,4 mió. kr. Sparikassin roknar við, at hesin váðin minkar enn meira í 2012.

Íløguognir eru fastognir, sum sparikassin hevur gjørt íløgu í, men sum ikki eru til egna nýtslu. Broytingar í dagsvirði verða førdar sum virðisjavnan av íløguognum. Virðismetingin er gjørd út frá netto leiguinntøku og einum avkastskravi, ið er millum 7% og 8%.

Sparikassin hevði í 2011 eitt hall av virðisjavnan av fíggjarligum tólum upp á tilsamans 6,3 mió. kr. Hallið stavar í høvuðsheitinum frá fallandi marknaðarrentu.

## Útreiðslur til starvsfólk og umsiting

Samlaðu útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting gjørdust 57,2 mió. kr. í 2011 móti 63,6 mió. kr. í 2010, ella ein minking upp á 6,4 mió. kr., og er hetta ein minking upp á 10%. Hesin postur er samansettur av løn til stjórn og starvsfólk, umframt øllum vanligum rakstrarútreiðslum.

Løn og samsýning til stjórn minkaðu við 2,5 mió. kr. úr 4,4 mió. kr. niður í 1,9 mió. kr., og stavar hetta frá avtalu um fráfaringarløn til undanfarnu stjórn upp á 2,5 mió. kr. í 2010. Galdandi lønaravtala við stjórnina er ein føst bruttoløn upp á 1,9 mió. kr. um árið.

Løn og eftirløn til starvsfólk øktust úr 19,9 mió. kr. í 2010 uppí 23,5 mió. kr. í 2011, sum var ein øking upp á 3,6 mió. kr. Meginparturin av hesi øking stavar frá avsetingum móti skyldugum lønum og frítíðarlønum fyri árini 2010 og 2011, meðan restin stavar frá eykaarbeiði í samband við økt fyrisitingarlig krøv. Útreiðslur til sosiala trygd, hetta eru útreiðslur til lønarhæddaravgjald, ALS, grunnar v.m., minkaðu við 0,1 mió. kr. í 2011. Av tí, at peningastovnsvirksemi ikki er mvg-skyldugt, er ístaðin álagt peningastovnum at gjalda 10% av øllum útgoldnum lønum til landskassan.

Útreiðslur til umsiting minkaðu úr 35,2 mió. kr. í 2010 niður í 28 mió. kr. í 2011, ið er ein minking upp á 7,2 mió. kr. ella 20,5%. Sparikassin arbeiðir miðvíst við at tillaga kostnaðarstøðið til minkandi útlánsvirksemið, og hendan gongdin heldur fram í 2012.

## Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum eru minkaðar við 0,5 mió. kr. frá 4 mió. kr. í 2010 til 3,5 mió. kr. í 2011. Umframt avskriving av rakstrargøgnum, eru í hesum posti avskrivingar av egnum føstum ognum, sum sparikassin nýtir til sítt virksemi, umframt avskriving av innrætting av leigaðum hølum. Sparikassin endurmetir virðið á egnum ognum í mun til marknaðarleigu við einum avkastskravi upp á 7%. Ein virðisbroyting av egnum ognum, sum liggur innanfyri útveganarvirðið, verður eisini bókað undir hendan postin.

## Aðrar rakstrarútreiðslur

Her er talan um provisjónskostnað í samband við Bankapakka 1, sum fór úr gildi tann 30. september 2010. Hesin kostnaður var 0 í 2011, samanborin við eina útreiðslu upp á 5,2 mió. kr. í 2010.

## Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar

Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar minkaðu úr 49,3 mió. kr. í 2010 niður í 11,3 mió. kr. í 2011. Hetta er ein minking upp á 38 mió. kr. og sostatt størsta einstaka broytingin í ársroknskapinum fyri 2011.

Sparikassin metir nú, at tann versti parturin av fíggjarkreppuni er av, men eftirskjálvtar av fíggjarkreppuni verða framhaldandi at síggja í roknskapunum hjá sparikassanum næstu árini.

Fíggjareftirlitið hevur í mars 2012 sett í gildi dagføring av kunngerð um fíggjarliga rapportering fyri danskar peningastovnar, sum helst eisini fer at galda fyri føroyskar peningastovnar. Kunngerðin hevur millum annað við sær herd krøv til niðurskrivingar í peningastovnum. Enn er ov tíðliga at meta um, hvussu stóra ávirkan hetta kann fáa á roknskapin hjá sparikassanum, men sparikassin fylgir væl við gongdini.

Grundað á gongdina í samfelagnum og herdum niðurskrivingarkrøvum til peningastovnar, metir sparikassin, at sannlíkindi eru fyri, at niðurskrivingar framvegis verða at síggja í roknskapunum komandi árini.

## Kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum

Virðisjavnan av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum gav 0 kr. í 2011, móti einum halli á 88 tkr. í 2010.

## Skattur

Sparikassin hevur í roknskapinum fyri 2008 og 2009 aktiverað skatt av halli fyri tilsamans 16,2 mió. kr. Íroknað hallini í 2010 og 2011 er samlaða hallið nú 167,1 mió. kr. Tá sparikassin í sínum metingum næstu 3-5 árini roknar við, at samlaða avlopið ikki fer at svara til samlaða skattliga hallið, hevur sparikassin tí valt ikki at aktivera skatt av hallinum fyri 2011.

## Fíggjarstøða

Fíggjarstøða sparikassans minkaði við 308 mió. kr., úr 2.493 mió. kr. til 2.185 mió. kr., ella 12,4%.

Útlán eru minkað úr 1.702 mió. kr. í 2010 til 1.624 mió. kr. í 2011, ella 4,6%.

Innlán sparikassans eru í 2011 økt við 4,3 mió. kr. úr 1.581 mió. kr. til 1.585 mió. kr. ella 0,3%.

Innlánsundirskotið er minkað við 89 mió. kr. í 2011, úr 121 mió. kr. niður í 39 mió. kr.

Útlánsprosentið fall úr 113,6% við ársenda 2010 til 107% við ársenda 2011. Sparikassin miðar eftir at hava eitt útlánsprosent, sum liggur umleið 100 ella lægri.

Skyldur, ið ikki eru førdar í fíggjarstøðuna, eru hækkaðar við 8,7 mió. kr., úr 35,8 mió. kr. í 2010 til 44,5 mió. kr. í 2011.

## Gjaldføri

Stóra fallið í innlánsundirskotinum í 2011 hevur givið sparikassanum gott gjaldføri 2011, sum sparikassin hevur nýtt til at afturgjalda lán við. Eftir at sparikassin hevur afturgoldið lán við 300 mió. kr., er yvirdekningurin í mun til lógarkravið við árslok 2011 uppgjørdur til 128% í mun til 218% við árslok í 2010.

Eins og flestu aðrir peningastovnar fyrireikaði Norðoya Sparikassi seg til 30. september 2010, tá ið statsveðhaldið fyri øllum innlánum sambært Bankapakka 1 fór úr gildi. Tann 28. juni 2010 tók sparikassin sambært hesi avtalu lán upp á 650 mió. kr. Lánið fellur til gjaldingar í seinasta lagi 28. juni 2013, men tað ber eisini til at gjalda tað aftur áðrenn tíðina.

Sparikassin hevur í 2011 niðurgoldið lánið við 300 mió. kr., og í 1. ársfjórðingi í 2012 niðurgoldið 50 mió. kr., soleiðis at lánið nú er komið niður á 300 mió. kr.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið hevur í juni 2010 kunngjørt ein sokallaðan eftirlitsdiamant, sum kemur í gildi í 2012. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ein ov høgan váða. Niðanfyri er ein stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans liggur í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið liggur sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar tilsamans** (skulu vera undir 125% av basiskapitalinum)**:**
  Stórir kundar tilsamans í sparikassanum eru við árslok 2011 uppgjørdir til 91,7% av basiskapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20% um árið)**:**
  Sparikassin hevði í 2011 eina minking í útlánum.
- **Útlán til fastognir** (skulu vera minni enn 25% av samlaðu útlánunum)**:**
  Við árslok 2011 vóru útlán sparikassans til fastognir 6% av samlaðu útlánunum.
- **Fíggingarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár. Skal vera minni enn 1)**:**
  Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,75 við ársenda 2011.
- **Gjaldførið yvir lógarinnar kravi** (skal vera størri enn 50%)**:**
  Sparikassin hevur við ársenda 2011 uppgjørt gjaldførið yvir lógarinnar kravi til 128%.

## Solvensur og kapitalviðurskifti

Basiskapitalur sparikassans er, eftir at hallið í 2011 er drigið frá, 209,6 mió. kr.

Solvensur sparikassans var við árslok 2011 uppgjørdur til 16,4% móti 14,8% við árslok í 2010.

Umframt at gera upp lógarkravda solvensin skal sparikassin gera upp ein individuellan solvenstørv, sum við árslok varð uppgjørdur til 11,5%. Munurin millum solvens og solvenstørv er 4,9%, svarandi til ein solvensyvirdekning upp á 42,6%. Hetta er eitt mát, sum javnan verður nýtt, tá metast skal um mótstøðuføri móti komandi tapum hjá einum peningastovni.

Fíggjareftirlitið hevur í sínum frágreiðingum í 2011 boðað frá, at ætlanin er at herða krøvini til uppgerð av solvenstørvi frá 2013. Sparikassin metir, at hesar herðingar í uppgerðarháttinum viðføra eina ávísa hækking í solvenstørvinum hjá sparikassanum, og eina tilsvarandi minking í solvensyvirdekninginum. Við einum solvensyvirdekningi upp á 4,9% metir sparikassin hetta ikki verða ein trupulleika fyri sparikassan.

Fyri at varðveita góða solvensyvirdekningin og fyrireika sparikassan til broyttu umstøðurnar í 2013, arbeiðir sparikassin við at minka um kredittváðan. Størsti kredittváðin hjá sparikassanum knýtir seg til størru útlánini, og arbeiðir sparikassin tí miðvíst við eini ætlan um at minka um henda váða í 2012.

Sparikassin metir javnan um grundarlagið undir hesi uppgerð, mannagongdina í samband við hesa uppgerð, og tær fyritreytir, ið verða lagdar sum grundarlag undir uppgerðini. Nærri er greitt frá um hesi viðurskifti undir váðar og váðastýring.

Við støði í hesum metir leiðsla sparikassans, at solvensur sparikassans er nøktandi til tess at dekka tann váða, ið stendst av virksemi sparikassans.

## Grannskoðaranevnd

Kunngerðin um grannskoðaranevnd, sum er galdandi fyri danskar peningastovnar, er ikki sett í gildi fyri Føroyar. Sparikassin hevur av sínum eintingum valt at skipa eina óformliga grannskoðaranevnd, sum arbeiðir eftir donsku kunngerðini.

Nevnd sparikassans hevur valt eina sjálvstøðuga grannskoðaranevnd, ið er mannað við 3 limum, og eru teir:
John P. Danielsen, Jóannes Hansen og Erling Petersen.

Nevndin hevur eisini innstillað John P. Danielsen sum roknskaparkønan lim í grannskoðaranevndini sambært ásetingunum í kunngerðini.

Nevnd sparikassans hevur góðkent arbeiðssetning og arbeiðsætlan hjá grannskoðaranevndini.

Arbeiðið í grannskoðaranevndini fevnir millum annað um at fylgja við í:

- arbeiðinum at gera roknskap
- um sparikassans innaneftirlit og váðastýring eru á einum nøktandi støði
- arbeiðinum hjá grannskoðanini

Grannskoðaranevndin hevur umleið 3 fundir árliga og innstillar til nevndina.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Í 1. ársfjórðingi 2012 hevur sparikassin afturgoldið 50 mió. kr. av láninum við individuellum statsveðhaldi. Eftir hetta er restskuldin 300 mió. kr.

Tað eru ongar aðrar hendingar ella viðurskifti eftir roknskaparlok, ið kunnu flyta metingina av ársfrásøgn sparikassans fyri 2011.

## Meting um 2012

Fallandi útlánsvirksemið og lága rentustøðið hava gjørt sítt til, at rentuinntøkurnar ikki hava staðið mát í 2011, og gjørdi sparikassin tí av at hækka rentuískoytið á øllum vinnulánum við 0,5%-stigi í desember 2011. Útreiðslustigið hjá sparikassanum var í 2011 83% í mun til 94% í 2010. Við tillagingum av rakstrinum í 2012 miðar sparikassin móti einum útreiðslustigi, sum liggur undir 80%.

Tað er okkara fatan, at útlitini fyri avlopi av vanligum rakstri í 2012 eru betri enn í fjør. Um sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum upp á útlán, verður talan um eitt avlop á umleið 15 mió. kr.

Tann 28. juni 2010 gjørdi sparikassin brúk av møguleikanum at læna 650 mió. kr. við individuellum statsveðhaldi í Bankapakka 1. Lánið fellur til gjaldingar í seinasta lagi 28. juni 2013. Sparikassin hevur gott gjaldføri, og hevur tí í 2011 niðurgoldið lánið við 300 mió. kr. og aftur í 1. ársfjórðingi í 2012 við 50 mió. kr., soleiðis at lánið í dag er komið niður á 300 mió. kr. Sparikassin hevur í síni langtíðar gjaldsførisætlan lagt upp fyri, at lánið verður niðurgoldið við 100 mió. kr. afturat í 2012 og 100 mió. kr. aftur í 2013, meðan restin av láninum, 100 mió. kr., verður umfíggjað til 3-ára lán frá Tjóðbankanum.

Innlánsundirskotið minkaði við 89 mió. kr. í 2011, úr 121 mió. kr. niður í 39 mió. kr. Gongst sum ætlað, fer sparikassin at hava innlánsyvirskot í 2012.

## Váðar og váðastýring

Tað áliggur nevnd sparikassans at syrgja fyri, at sparikassin hevur eina vælvirkandi váðastýring, soleiðis at allir týðandi váðar verða eyðmerktir, og at hóskandi skipanir eru til váðastýring. Harafturat skulu váðapolitikkur og váðakarmar fastleggjast.

Sum partur av regluligu kunningini til nevndina, verður váðafrágreiðing viðvíkjandi teimum týðandi váðaorsøkunum løgd fyri nevndina hvønn ársfjórðing. Tað áliggur stjórnini at tryggja, at nøktandi innanhýsis mannagongdir eru í samband við máting og stýring av váða. Í sparikassanum er skilnaður ímillum eindirnar, sum avgreiða, og tær sum hava eftirlit.

Rakstur av peningastovnsvirksemi inniber, at man átekur sær nakrar serligar váðar, herundir kredittváðar, marknaðarváðar, gjaldførisváðar og operatiónellar váðar. Hesum váðum, sum eru lýstir niðanfyri, sýnir sparikassin serligan ans í dagliga virki sínum, tí endamálið við sparikassans politikki er at avmarka tey tap, sum millum annað kunnu standast av óvæntaðari gongd á fíggjarmarknaðunum.

Tað kunnu verða aðrir váðar, umframt teir, sum verða lýstir her, sum kunnu hava ávirkan fyri framhaldandi rakstur og menning av sparikassanum, men leiðslan metir, at teir lýstu váðarnir, eru teir mest týðandi. Endamálið við hesum upplýsingum um váðar og váðastýring er at geva teimum, sum hava áhugamál í sparikassanum, betri møguleika at meta um váðaprofil og kapitaltørv sparikassans.

### Váðaábyrgdarhavandi

Í mars 2012 hevur sparikassin útnevnt eitt starvsfólk sum váðaábyrgdarhavandi samsvarandi nýggjari kunngerð um leiðslu og stýring av peningastovnum. Tað er eitt krav at váðaábyrgdarhavandi er óheftur av teimum eindum, sum átaka váða. Uppgávan hjá váðaábyrgdarhavandi er m.a. at tryggja at váðastýring sparikassans innan øll váðaøkir er nøktandi, og at leiðsla sparikassans hevur eina greiða mynd av samlaða váða sparikassans.

### Kredittváði

Kredittváði merkir, at vandi er fyri, at tap íkemur, tá skuldarin ikki afturrindar lán og kredittir, tá hesi fella til gjaldingar, og á sama hátt, tá ábyrgdir skulu gerast upp.

Sparikassin leggur í sínum kredittpolitikki og í síni kredittstýring herðslu á, at hvørki einstøk tap ella fleiri samlað tap innan ávísar vinnugreinar skulu kunna gerast so stór, at hesi í síðsta enda kunnu hava álvarsligar fylgjur fyri sparikassans solvens. Tí arbeiðir sparikassin miðvíst og áhaldandi við at avmarka kredittváðan, bæði sæð samlað og innan ávísar vinnugreinar.

Sambært galdandi kredittpolitikki sparikassans kunnu vinnulán vera millum 30 og 40% av samlaða kredittváða sparikassans. Ásett eru eisini ítøkilig mørk viðvíkjandi vinnugreinabýtinum.

Landafrøðiliga spjaðingin av útlánsvirksemi sparikassans er í dag soleiðis, at kundagrundarlagið nú fevnir um alt føroyska meginøkið. Fram til 2005 virkaði sparikassin bert í sera avmarkaðan mun uttanfyri Norðoyggjar og Leirvík. Í dag er talan á leið um helvtarbýti. Útlán og innlán sparikassans øktust nógv árini frá 2005-2007. Seinnu árini hevur sparikassin staðfest í sínum kreditpolitikki, at sparikassin skal avmarka váðan, og hetta, saman við minkandi eftirspurningi, hevur ført til, at útlán sparikassans eins og kreditváðin eru minkað frá og við 2009.

Ein bólkur av sínamillum samanhangandi kundum, verður roknaður sum eitt engagement, sambært galdandi kunngerð um stór engagement, og um engagementið eftir frádrátt sambært kunngerð er 10% av basiskapitalinum, verður tað roknað sum eitt stórt engagement. Eftirlitisdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum ásetur, at summurin av stórum engagementum ikki skal fara upp um 125% av basiskapitalinum. Grundað á basiskapital sparikassans pr. 31.12.2011, sum var kr. 209.603.655, verður eitt engagement roknað sum stórt engagement, um tað er kr. 20.960.365 ella størri. Summurin av stórum engagementum var 91,7% av basiskapitali sparikassans svarandi til 192 mió. kr., sum er munandi minni enn markið í eftirlitisdiamantinum.

Tó hevur sparikassin í galdandi kredittpolitikki ásett, at hetta lyklatalið skal minka í 2012. Sparikassin væntar at einstøk engagement av náttúrligum ávum fara niður um 10%-markið, umframt at onnur minka í tráð við tær ætlanir, sum lagdar eru fyri einstøku engagementini.

Sparikassin hevði óvanliga stórar niðurskrivingar av útlánum árini 2008 - 2010. Niðurskrivingarnar minkaðu munandi í 2011 og vóru nærri einum normalum støði.

## Kredittviðgerðin

Sparikassin hevur seinastu trý árini raðfest kredittfunktiónina frammarlaga og leiðsla sparikassans ásannar, at kredittfunktiónin er ein sera týðandi partur í váðastýringini og kreditviðgerðini. Uppgávan hjá kredittfunktiónini er at syrgja fyri at øll engagement verða gjøgnumgingin í minsta lagi einaferð árliga. Gjøgnumgongdin umfatar m.a. greining av gjaldsevni og fíggjarstøðu kundans. Sparikassin ásetur við støði í framdu greiningunum, karakter á hvørt einstakt engagement, samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Karaktergevingin gevur leiðsluni eina mynd av bonitetinum hjá kundum sparikassans sum heild, og tryggjar eyðmerking av veikum engagementum. Kredittfunktiónin skal somuleiðis tryggja, at málsetningar og ásetingar í kredittpolitikkinum verða fylgdar, herundir m.a., at neyðug orka er avsett til eina effektiva viðgerð av truplum engagementum. Hetta er fyri at avmarka tapsvandan. Regluligar kredittfrágreiðingar verða latnar nevnd sparikassans. Hetta er ætlað sum amboð hjá nevndini at eyðmerkja og stýra kredittváða sparikassans, sum umrøtt omanfyri.

Sparikassin metir í minsta lagi hvønn ársfjórðing um tørvin á niðurskriving av einstøkum útlánum og av niðurskriving upp á bólkar av útlánum við felags váðaeyðkennum. Somuleiðis verður mett hvønn ársfjórðing um tørvin at burturleggja upp á ábyrgdir. Bólkaniðurskrivingin verður roknað eftir myndli, sum er mentur av Lokale Pengeinstitutter, ið er ein felagsskapur av peningastovnum í Danmark og Føroyum, sum Norðoya Sparikassi er limur í.

## Marknaðarváði

Marknaðarváði er at rokna sum váðin fyri, at marknaðarvirðið av sparikassans aktivum og passivum ávirkast av broytingum í marknaðinum. Marknaðarváðin fevnir um rentu-, gjaldoyra- og partabrævaváða.

## Rentuváði

Rentuváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við rentubroytingar á fíggjarmarknaðunum. Upphæddin, sum upplýst er í roknskapinum sum rentuváði, er kurstap, sum sparikassin fær, um rentustøðið hækkar 1%-stig.

Sparikassin hevur framvegis ein lágan rentuváða. Tann 31.12.2011 var rentuváðin 3,2 mió. kr. Hetta svarar til 1,5% av basiskapitalinum.

## Partabrævaváði

Partabrævaváðin er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í partabrævakursum.

Partabrævaíløgur fevna um børsskrásett partabrøv, óskrásett partabrøv og kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum. Sparikassin hevur eingi børskrásett partabrøv. Í notunum er upplýst, hvørji tey tilknýttu og assosieraðu feløgini eru, og eisini verður víst til frágreiðing aðrastaðni um nýttan roknskaparhátt. Dagsvirðið av kapitalpørtunum er tengt at gongdini og útlitunum hjá hesum feløgum. Sparikassin hevur í 2011 selt burtur av óskrásettu partabrøvunum og á tann hátt minkað munandi um váðan á hesum øki.

## Gjaldoyraváði

Gjaldoyraváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í gjaldoyrakursum.

Sparikassin hevur gjaldoyraváða í samband við goymslu av kontantum gjaldoyra. Sparikassin hevur altíð eina hóskandi nøgd í ávísum gjaldoyrum í sambandi við kontantan handil við viðskiftafólk. Sparikassin hevur ikki aðra ogn ella skuld í fremmandum gjaldoyra.

Gjaldoyrastøða sparikassans, sum er upplýst undir lyklatølunum, var 0 tann 31.12.2011.

## Gjaldførisváði

Gjaldførisváði er váðin fyri, at sparikassin ikki er mentur at halda gjaldsskyldur sínar, um gjaldførið ikki er nøktandi.

Somuleiðis kann vandi vera fyri, at útvegan av gjaldføri gerst meira kostnaðarmikið, enn roknað verður við. Sparikassin leggur í stýringini av gjaldførisváðanum herðslu á at tryggja eitt gott gjaldføri bæði í mun til stuttfreistaðar og langfreistaðar skyldur, og at fíggingarkostnaðurin er rímiligur.

Galdandi lóg ásetir minstukrøv til gjaldføri sparikassans og harafturat ásetur eftirlitisdiamanturin eitt mark, sum er 50% størri enn lógarkravið. Sparikassin ásetur sjálvur eitt innanhýsis krav til gjaldføri, sum er munandi hægri enn minstukrøvini sambært lógini og eftirlitisdiamantinum. Tann 31.12.2011 var yvirdekningurin í mun til minstakrav lógarinnar 128,3%.

Sparikassin fylgir neyvt við gongdini í gjaldførinum, soleiðis at neyðug stig kunnu takast um óvæntaðar broytingar koma fyri. Sparikassin hevur eina ætlan við ítøkiligum tiltøkum, sum kunnu setast í verk um gjaldførið fer niður um innanhýsis ásetta markið.

Innlán í sparikassanum eru fevnd av trygdini frá Innskjótaraábyrgdargrunninum. Trygdin er EUR 100.000, sum svarar til umleið DKK 744.000 fyri hvønn innskjótara, umframt at ávís serlig innlán eru dekkað uttan mun til upphædd.

Sparikassin útskrivaði í juni 2010 eitt lánsbrævalán upp á kr. 650 mió. kr. við statsveðhaldi. Lánitíðin var upprunaliga trý ár við møguleika at afturgjalda heilt ella partvíst frammanundan. Við árslok 2011 var restskuldin 350 mió. kr. Sparikassin fylgir neyvt eini afturgjaldingarætlan, sum sparikassin gjørdi í juni 2011, og sum er partur av yvirskipaðu gjaldførisætlan sparikassans.

## Operatiónellur váði

Hetta er váði í samband við tap, sum kunnu koma beinleiðis ella óbeinleiðis av manglandi ella skeivum innanhýsis mannagongdum, menniskjaligum mistøkum, feilum í skipanum ella av uttanífrá komandi hendingum. Somuleiðis er váði í sambandi við umdømið umfatað av operatiónella váðanum.

Sparikassin stýrir hesum váða við virkisgongdum og innanhýsis eftirliti. Virkisgongdirnar verða javnan endurskoðaðar og broyttar um neyðugt, umframt at nýggjar verða mentar eftir tørvi.

Sparikassin hevur í 2011 dagført trygdarfyriskipanir og tilbúgvingarætlanir. Tilbúgvingin verður regluliga roynd við venjingum.

Sparikassin avsetur neyðuga orku til eftirlit, og verða eftirlitisuppgávurnar framdar av starvsfólki, sum fyriskipanarliga eru óheft av teimum, sum avgreiða.

# 2011















# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 4 | Rentuinntøkur o.a. | 116.744 | 127.199 |
| 5 | Rentuútreiðslur o.a. | 50.438 | 53.964 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **66.306** | **73.235** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 46 | 47 |
| 6 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 6.259 | 4.535 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 539 | 864 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **72.072** | **76.953** |
| | | | |
| 7 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum, gjaldoyra o.ø. | -2.381 | -13.421 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 548 | 785 |
| 8 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 57.235 | 63.564 |
| 9 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 3.491 | 3.986 |
| 10 | Aðrar rakstrarútreiðslur | 0 | 5.205 |
| 11 | Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 11.323 | 49.306 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 0 | -88 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **-1.810** | **-57.832** |
| | | | |
| 12 | Skattur | 0 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **-1.810** | **-57.832** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 43.987 | 311.763 |
| 13 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 161.151 | 36.653 |
| 14 | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.623.652 | 1.702.258 |
| 15 | Lánsbrøv til dagsvirði | 10.242 | 74.959 |
| 15 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 242.215 | 246.149 |
| 16 | Partabrøv o.a. | 11.396 | 30.988 |
| 17 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 1.008 | 1.008 |
| 18 | Fastognir íalt | 40.566 | 38.742 |
| | Íløguognir | 21.644 | 17.069 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 18.922 | 21.673 |
| | Aðrar materiellar ognir | 11.969 | 14.915 |
| 19 | Útsett skattaáogn | 16.215 | 16.202 |
| | Yvirtiknar ognir | 15.470 | 13.771 |
| 20 | Aðrar ognir | 6.674 | 5.668 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.184.545** | **2.493.076** |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | **Skuld** | | |
| 21 | Skuld til peningastovnar | 80 | 76 |
| 22 | Innlán | 1.585.004 | 1.580.707 |
| 23 | Útgivin lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 349.843 | 649.513 |
| | Onnur skuld | 21.197 | 19.997 |
| | Tíðarskeiðsavmarkingar | 172 | 126 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.956.296** | **2.250.419** |
| | **Avsetingar** | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.430 | 2.474 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 0 | 13.328 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.430** | **15.802** |
| 24 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **50.374** | **50.094** |
| | **Eginpeningur** | | |
| 25 | Ábyrgdarpeningur | 7.129 | 6.635 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 170.126 | 227.958 |
| | Flutt frá ársúrsliti | -1.810 | -57.832 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **175.445** | **176.761** |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.184.545** | **2.493.076** |

# Útgreining av eginpeningi

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.635 | 6.763 |
| | Tilgongd í árinum | 588 | 0 |
| | Frágongd í árinum | 94 | 128 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **7.129** | **6.635** |
| | | | |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 170.126 | 227.958 |
| | | | |
| | Flutt frá ársúrsliti | -1.810 | -57.832 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **168.316** | **170.126** |
| | | | |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **175.445** | **176.761** |

# Yvirlit yvir notur


| Nota | | Síða |
|---|---|---|
| 1 | KAPITAL- OG SOLVENSUPPGERÐ | 20 |
| 2 | NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 21 |
| 3 | 5 ÁRA HØVUÐS- OG LYKLATØL | 28 |
| | NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN | |
| 4 | RENTUINNTØKUR | 29 |
| 5 | RENTUÚTREIÐSLUR | 29 |
| 6 | KOSTNAÐAR- OG PROVISJÓNSINNTØKUR | 29 |
| 7 | VIRÐISJAVNAN | 29 |
| 8 | ÚTREIÐSLUR TIL STARVSFÓLK OG FYRISITING | 29 |
| 9 | AV- OG NIÐURSKRIVINGAR AV ÍTØKILIGUM OGNUM | 30 |
| 10 | AÐRAR RAKSTRARÚTREIÐSLUR | 30 |
| 11 | NIÐURSKRIVINGAR UPP Á ÚTLÁN V.M. | 30 |
| 12 | SKATTUR | 32 |
| | NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA | |
| 13 | OGN HJÁ FÍGGJARSTOVNUM OG TJÓÐBANKUM | 32 |
| 14 | ÚTLÁN | 32 |
| 15 | LÁNSBRØV | 32 |
| 16 | PARTABRØV | 32 |
| 17 | KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM FYRITØKUM | 33 |
| 18 | ÍTØKILIGAR OGNIR | 34 |
| 19 | ÚTSETT SKATTAÁOGN | 34 |
| 20 | AÐRAR OGNIR | 34 |
| 21 | SKULD TIL PENINGASTOVNAR OG TJÓÐBANKAR | 35 |
| 22 | INNLÁN | 35 |
| 23 | ÚTGIVIN LÁNSBRØV | 35 |
| 24 | EFTIRSTILLAÐ KAPITALINNSKOT | 35 |
| 25 | ÁBYRGDARPENINGUR | 36 |
| 26 | AÐRAR SKYLDIR UTTANFYRI JAVNAN | 36 |
| 27 | OGNIR SETTAR SUM TRYGD | 36 |
| 28 | OGNARVIÐURSKIFTI | 36 |
| 29 | NÆRSTANDANDI PARTAR | 36 |
| 30 | NEVND OG STJÓRN | 37 |
| | NOTUR UM AÐRAR UPPLÝSINGAR | |
| 31 | KREDITTVÁÐAR | 37 |
| 32 | MARKNAÐARVÁÐAR | 39 |
| 33 | RENTUVÁÐAR | 39 |

# Notur

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Kapital- og solvensuppgerð** | | |
| | Eginpeningur | 175.445 | 176.761 |
| | Útsett skattaáogn | -16.215 | -16.202 |
| | Hybridur kjarnukapitalur | 50.374 | 50.094 |
| | **Kjarnukapitalur, aftaná frádrøg** | **209.604** | **210.653** |
| | | | |
| | Eginpeningur | 175.445 | 176.761 |
| | Útsett skattaáogn | -16.215 | -16.202 |
| | Hybridur kjarnukapitalur | 50.374 | 50.094 |
| | **Basiskapitalur áðrenn frádrøg** | **209.604** | **210.653** |
| | | | |
| | **Basiskapitalur aftaná frádrøg** | **209.604** | **210.653** |
| | | | |
| | **Váðavektaðar ognir** | | |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 1.159.974 | 1.296.195 |
| | | | |
| | Vektað tøl við marknaðarváða | 731 | 675 |
| | Vektað tøl við operationellum váða | 118.138 | 125.044 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar | -4.815 | -3.046 |
| | **Vektað tøl tilsamans** | **1.275.625** | **1.418.868** |
| | | | |
| | Kapitalkrav sparikassans sambært grein 124, stk. 2 | 102.050 | 113.509 |
| | | | |
| | Solvensprosent | 16,4% | 14,8% |
| | | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 16,4% | 14,8% |

Nota

2 Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvar við lóg um fíggjarligt virksemi o.a. umframt kunngerð um framløgu av fíggjarligum frágreiðingum hjá kredittstovnum v.m.

## Broyting í roknskaparligum metingum og villur

Um undanfarnar ársfrásagnir í størri mun eru ávirkaðar av villum í samband við roknskapararbeiðið, verða øll roknskapartøl, ið ávirkast av hesum, íroknað samanberingstøl, viðmerkingar og 5 ára yvirlit, broytt sum um villurnar ikki vóru íkomnar.

Í samband við at sparikassin fyri nøkrum árum síðan veitti fastrentaða lánifígging, hevur sparikassin gjørt brúk av fíggjarligum tólum í sambandi við roknskaparliga trygging av hesum rentuváða. Sparikassin staðfestir, at fallandi marknaðarrentan hevur ført til, at hesi tól við ársenda høvdu eitt negativt marknaðarvirði upp á tilsamans 10,6 mió. kr. Sparikassin hevur somuleiðis staðfest í 2011, at hesi fíggjarligu tól ikki lúka treytirnar fyri roknskaparligari trygging sambært kunngerð um fíggjarligari rapportering, og hevur tí valt at broyta roknskapin. Broytingarnar hava við sær, at øll skyldan nú verður avsett í roknskapinum. Broytingin í marknaðarvirðinum fyri 2011 er uppgjørd til 5,4 mió. kr. og er bókað sum virðisjavnan av fíggjarligum tólum. Restin 5,2 mió. kr. viðvíkja undanfarnum roknskaparárum og eru roknskapartølini broytt samsvarandi og upphæddin javnað yvir eginpeningin. Samanberingstøl og 5 ára yvirlit eru eisini tillagað hesari broyting. So hvørt fíggjarligu tólini verða niðurskrivað, lækkar negativa virðið og sparikassin verður tá at afturføra hesar skyldur.

Roknskaparliga ávirkanin av broytingini fyri 2007-2011 er fylgjandi:

| | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK | 2007<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|---|
| Virðisjavnan | -5.395 | -1.847 | -1.606 | -4.619 | 2.894 |
| Úrslit áðrenn skatt | -5.395 | -1.847 | -1.606 | -4.619 | 2.894 |
| Onnur skuld | 10.572 | 5.177 | 3.331 | 1.725 | 0 |
| Aðrar ognir | 0 | 0 | 0 | 0 | 2.894 |
| Eginpeningur | -10.572 | -5.177 | -3.331 | -1.725 | 2.894 |

## Alment um ásetan og máting

Allar inntøkur verða roknaðar við í rakstarroknskapin í mun til tað tíðarskeið, tær verða vunnar, og allar útreiðslur verða roknaðar við í tann mun, tær viðvíkja roknskaparárinum. Tó verða ávísir postar roknaðir beinleiðis umvegis eginognina, eftir at tann skattliga ávirkanin er ávikavist løgd afturat ella drigin frá.

Ogn verður roknað inn í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini koma sparikassanum tilgóðar, og ein meting av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða roknaðar við í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini ikki koma sparikassanum tilgóðar, og virðið av skylduni álítandi kann útroknast.

Keyp av fíggjarligum ognum verða roknað við í fíggjarstøðuna avrokningardagin. Somuleiðis verður hildið uppat við at rokna seldar fíggjarligar ognir við í fíggjarstøðuna avrokningardagin.

Hildið verður uppat at rokna fíggjarligar skyldur við í javnan, tá skyldan er hildin uppat gjøgnum uppfyllan, ella við at hon er sett ella farin úr gildi.

Við áseting og uppgerð av ognum og skyldum verður tikið atlit at upplýsingum, ið koma til okkara kunnleika eftir uppgerðardagin, og inntil vit gera ársfrásøgnina, um so er, at hesar upplýsingar staðfesta ella avnokta tey viðurskifti, ið eru komin fyri í seinasta lagi á uppgerðardegnum.

Tá ognir ella skyldur verða ásettar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða fastar ognir ásettar til keypsprís, fyrstu ferð tær verða innsettar í fíggjarstøðuna.

Aftaná hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar sum ásett fyri hvønn roknskaparpost sær niðanfyri. Keyp og søla av fíggjarligum ognum verða roknaðar við á avrokningardegnum.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða ásettar til amortiseraðan útveganarkostnað, soleiðis at tær verða roknaðar við einari støðugari effektivari rentu alt avtalutíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaligt útveganarvirði við frádrátti av møguligum avdráttum og við ískoyti/frádráttum av allari amortiseringini av muninum millum útveganarkostnað og áljóðandi upphædd.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið av ávísum ognum og skyldum eru fevnd av metingum um, hvussu hendingar í framtíðini kunna ávirka virði av hesum ognum og skyldum.

Tey øki, har roknskaparligar metingar hava størst ávirkan á roknskapin, eru fylgjandi:

- Niðurskrivingar upp á útlán
- Dagsvirði av óskrásettum fíggjarligum ognum
- Dagsvirði av føstum ognum
- Útsett skattaáogn

Tær metingar, ið eru gjørdar, eru við grundarlagi í fyritreytum, sum leiðslan metir vera forsvarligar, men sum eru ótryggar. Harumframt er sparikassin ávirkaður av váðum og ótryggleikum, ið kunnu føra við sær, at tey uppgjørdu úrslitini kunnu víkja frá metingunum. Tá talan er um niðurskrivingar upp á útlán og annan ágóða, eru týðandi metingar gjørdar í samband við ásetan av váðanum fyri, at ikki allar ásettar framtíðar gjaldingar verða móttiknar.

## Niðurskrivingar upp á útlán

Niðurskrivingar upp á útlán verða gjørdar við at taka atlit at virðislækking á útlánum. Niðurskrivingar verða gjørdar sum ein samanseting av stakum niðurskrivingum og niðurskrivingum upp á bólkar, og eru fevndar av fleiri metingum, eitt nú fyri hvørji útlán ella bólkar av útlánum, er staðfest objektiv ábending um virðislækking, metingar um framtíðar gjaldingar og áseting av virði av veittum trygdum.

## Dagsvirði av ikki skrásettum fíggjarligum ognum

Dagsvirði av óskrásettum fíggjarligum ognum verður ikki í øllum førum stuðlað av gjørdum marknaðarskrásetingum, og ger hetta, at ásetingar av dagsvirðum í stóran mun eru grundað á roknskaparligar ásetingar og metingar.

## Dagsvirði av føstum ognum

Tá dagsvirði av ognum til egna nýtslu og íløguognum verður ásett, er hetta knýtt at roknskaparligum metingum, heruppií, hvat vit vænta, at ognirnar væntast at kasta av sær og krøv til avkastprosent, ið sett verða til ognirnar.

## Útskotin skattaáogn

Framførd skattlig hall verða tikin við í uppgerðina av útsettari skattaáogn í tann mun, tað er sannlíkt, at tað verður roknað við, at tað í framtíðini væntast at verða ein skattskyldug inntøka til ráðs, har framførda hallið kann gagnnýtast. Áseting av útsettari skattaáogn ber sostatt við sær eina framskriving og meting av framtíðar skattskyldugari inntøku.

## Samtaksroknskapur

Sparikassin átti einki dóttirfelag í 2011, og ger tí ikki samtaksroknskap.

Fyritøkur, ið ikki verða stýrdar av sparikassanum, ella har sparikassin ikki útinnir avgerandi ávirkan, verða mettar sum assosieraðar fyritøkur.

### Útlendskt gjaldoyra
Ágóði, skyldur og aðrir gjaldoyraligir postar í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknað uppgerðardagin, verða umroknað við tí endakursi, sum er galdandi fyri viðkomandi gjaldoyra uppgerðardagin. Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin, gjaldsdagin, og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Virðisjavnan'.

### Mótrokning
Áogn og skyldur verða bert mótroknaðar, um løgfrøðisligur rættur er til staðar at mótrokna upphæddir, og um tað er ætlanin at nettoavrokna ella realisera ognina og innfría skyldina samstundis.

## Rakstrarroknskapurin

### Rentur, kostnaður og provisjónir
Rentuinntøkur og rentuútreiðslur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin í tí tíðarskeiðinum, sum tær viðvíkja. Provisjónir og kostnaðarinntøkur, sum eru partar av effektivu rentuni av einum útláni, verða innroknaðar sum ein partur av amortiseraða kostprísinum og verða harvið inntøkuførdar yvir alt afturgjaldingarskeiðið á útláninum.

Rentuinntøkur av niðurskrivaðum parti av útláni verða førdar undir roknskaparpostinum niðurskrivingar upp á útlán og áognir v.m.

### Vinningsbýti av partabrøvum
Vinningsbýti av partabrøvum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um sparikassin hevur rætt til at taka ímóti vinningsbýtinum. Hetta verður vanliga gjørt, tá vinningsbýtið er samtykt á aðalfundi felagsins.

### Virðisjavnan
Virðisjavnan umfatar realiserað og órealiserað virðisjavnan av fíggjarognum og øðrum avleiddum fíggjaramboðum og virðisjavnan av dagsvirði av íløgum í fasta ogn.

### Aðrar rakstrarútreiðslur
Aðrar rakstrarútreiðslur umfata útreiðslur, sum ikki roknast uppí aðrar postar í rakstrarroknskapinum, herundir provisjón viðvíkjandi statstrygdini og útgjøld úr gávugrunni sparikassans.

### Niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m.
Niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m. inniheldur niðurskrivingar upp á útlán, áogn hjá peningastovnum og tjóðbankum og aðra áogn, sum kann hava við sær kredittváða. Eisini umfatað er burturlegging upp á ábyrgdir og óbrúktar kredittir og seinni virðisjavnan av hesum postum. Niðurskriving upp á ábyrgdir verður bókað sum burturlegging móti tapi upp á ábyrgdir. Niðurskriving upp á óbrúktar kredittir verður bókað sum aðrar burturlagdar skyldur.

### Skattur
Skattur í árinum, sum umfatar ársins aktuella skatt og broyting í útsettum skatti, verður í rakstrarroknskapinum bókað við tí partinum, sum stavar frá ársúrslitinum og beinleiðis á eginkapitalin við tí partinum, sum stavar frá bókingum beinleiðis á eginognina.

Sparikassin er ikki samskattaður við dótturfeløg.

## Fíggjarstøða

### Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum
Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum umfatar goymslu av peningaseðlum og myntum í øllum gjaldoyrum og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum.

## Áogn í peningastovnum og tjóðbankum

Áogn í peningastovnum og tjóðbankum umfatar áogn í peningastovnum og tíðarinnskot í tjóðbankum. Roknskaparposturin verður uppgjørdur sum amortiseraður kostprísur, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Útlán og aðrar áognir

Útlán og aðrar áognir verða uppgjørdar sum amortiseraður kostprísur frádrigið móttiknar kostnaðir og stovningarprovisjónir, har lagt er afturat munandi transaktiónskostnaðir, sum eru partur av effektivu rentuni á láninum.

Útlán og aðrar áognir verða javnan kannað fyri niðurskrivingartørv út frá fastløgdum objektivum ábendingum um virðisminking, partvíst einsæris fyri øll signifikant útlán og lán, sum ikki hóska í ein bólk, og partvíst sum bólkar av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Niðurskrivað verður við muninum millum roknskaparliga virðið áðrenn niðurskrivingar og nútíðarvirðið av væntaðu framtíðar gjaldsstreyminum av útláninum.

Ein objektiv ábending um virðisminking verður roknað at vera til staðar, um ein ella fleiri av hesum hendingum fyriliggja:

- Lántakarin er í fíggjarligum trupulleikum
- Lántakarin heldur ikki treytirnar í lánsavtaluni
- Treytirnar í lánsavtaluni vera gjørdar linari vegna lántakarans fíggjarligu trupulleikar
- ella tað er sannlíkt, at lántakarin fer í konkurs ella verður umfataður av aðrari fíggjarligari endurreisn

Fyri útlán og ágóðar, sum ikki eru niðurskrivað einsæris, metir sparikassin fyri hvønn bólk av útlánum, hvørt talan er um objektiva ábending um virðisminking.

Sparikassin metir um niðurskrivingartørv av bólkum av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Sparikassin bólkar útlánini í 3 bólkar, ein fyri privatkundar og tveir fyri vinnukundar.

Metingin av bólkunum verður gjørd eftir einum segmenteringsmyndli, sum er mentur av Felagnum fyri Lokalar Pengastovnar, sum eisini stendur fyri viðlíkahaldi og framhaldandi menning av myndlinum. Myndilin fastleggur samanhangin i ymsu bólkunum millum staðfest tap og nakrar signifikantar forklárandi landsbúskaparligar variablar við eini linju regressiónsgreining. Sum variablar verður m.a. brúkt arbeiðsloysi, húsaprísir, renta, tal av konkursum/tvingsilssølum v.m.

Segmenteringsmyndilin er í útgangsstøðinum útroknaður grundað á tapsupplýsingar fyri allan peningastovnsgeiran. Sparikassin skal tí meta, um tilpassast skal til egin viðurskifti, soleiðis at tað eru hesi tilpassaðu estimatini, sum verða brúkt í útrokningini av niðurskriving upp á bólkar. Fyri hvønn bólk av útlánum og ágóðum fæst eitt estimat, sum sigur, hvussu stór virðisminkingin er í prosent av einum bólki á  fíggjarstøðudagfestingini. Við at samanbera upprunaliga tapsváðan fyri einstaka útlánið við tapsváðan við endan á aktuella roknskaparskeiðnum, framkemur upphæddin frá einstaka útláninum til niðurskrivingarnar fyri bólkar.

## Leasing

Norðoya Sparikassi hevur hvørki leasingogn ella skyldur.

## Fíggjarlig ogn (lánsbrøv og partabrøv)

Fíggjarlig ogn sum t.d. lánsbrøv, partabrøv og aðrir kapitalpartar verða bókaðir til dagsvirði.

Fyri virðisbrøv, sum eru skrásett á keypsskála, verður dagsvirðið ásett eftir alment noteraða kursinum við afturlating á fíggjarstøðudagfestingini, um ikki hesin kursur roknast fyri at vera misvísandi fyri veruliga dagsvirðið.

Í øllum øðrum førum verður dagsvirðið ásett eftir alment gókendum virðisásetingarháttum, sum hava til endamáls at áseta transaktiónsprísin, sum hevði verið við handli á uppgerðardegnum millum óvildugar partar, sum handla eftir vanligum handilsligum fortreytum.

Tá virðið verður mált, verður hædd tikin fyri øllum kendum marknaðarupplýsingum, sum kunnu metast at hava ávirkan á dagsvirðið, og sum luttakarar á marknaðinum væntast at taka við í prísásetingini av viðkomandi fíggjaramboði.

Um so er, at álítandi dagsvirði ikki kann ásetast fyri ónoteraðar kapitalpartar, verður virðið sett til kostprís.

## Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís

Íløgur sum sparikassin hevur heilt til gjalddagin, eru skrásettar á einum virknum marknaði, og eru keyptar við tí fyri eyga, at fáa vinning í tíðarskeiðinum fram til gjalddagin. Hesar íløgur, sum sparikassin hevur til gjalddagin, verða í fyrstu syftu roknaðar til dagsvirði, sum er kostprísur, umframt kostnaður ið beinleiðis kemur av keypinum. Í aðru syftu verða lánsbrøvini roknað til amortiseraðan kostprís.

Um niðurskrivingar skulu gerast, verða tær gjørdar sum við útlánum.

## Kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum

Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum vera í fíggjarstøðuni hjá móðurfelagnum roknað eftir innara virði.

Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum verða roknaðir eftir innara virði. Hesin háttur viðførir, at kapitalpartar verða roknaðir eftir lutfalsliga virðinum av roknskaparliga innara virðinum hjá fyritøkuni, har lagt verður afturat fyri grundaðum, men ikki gjøgnumførdum uppskrivingum av fastari ogn og eftir eliminering av gjøgnumførdum, men ikki grundaðum uppskrivingum av fastari ogn, út frá sparikassans vanligu krøvum til avkast av íløgum í fasta ogn upp á 7-8%.

Úrslitapartar eftir skatt og eliminering verður tikið við í rakstrarroknskapin.

## Íløguognir

Íløguognir umfata fastar ognir, sum sparikassin eigur, við tí endamáli at fáa leiguinntøkur og/ella kapitalvinning frá sølu.

Íløguognir verða settar til dagsvirði.

Dagsvirði fyri íløguognir verður sum høvuðsregla uppgjørt við støði í væntaða avkastinum av ognini eftir einum avkastprosenti, sum er einsæris ásett fyri ognina. Avkastprosentið er treytað av, hvar ognin liggur, slag av ogn, nýtslumøguleikum, innrætting og treytum í leigusáttmálum, og er sparikassans avkastkrav fyri íløguognir 7- 8%.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Virðisjavnan verður bókað yvir rakstrarroknskapin í roknskaparpostinum kursjavnan.

## Fastognir til egna nýtslu (domicilognir)

Fastognir til egna nýtslu (domicilognir) eru ognir, sum sparikassin brúkar til egnan rakstur sum fyrisiting, deild ella aðrar tænastur. Ognin verður roknað sum domicilogn, um meginparturin av samlaðu gólvvíddini verður brúktur til sparikassans egna rakstur.

Domicilognir verða settar til endurmett virði frádrigið avskrivingar.

Domicilognir skulu í fyrsta umfari ásetast til kostprís og í aðru atløgu ásetast til endurmett virði, sum er dagsvirði á metingardagfestingini frádrigið eftirfylgjandi av- og niðurskrivingar.

Dagsvirðið fyri domicilognir verður sum meginregla ásett við støði í væntaða avkastinum og einum einsæris ásettum avkastprosenti. Sparikassans krav til avkastprosent fyri domicilognir er 7%.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Endurmetingar verða gjørdar soleiðis, at roknskaparliga virðið ikki víkir munandi frá dagsvirðinum á dagfestingini fyri fíggjarstøðuna.

Avskrivingar fyri domicilognir verða roknaðar eftir linjuháttinum yvir væntaðu nýtslutíðina við støði í endurmetta virðinum. Væntaða nýtslutíðin er 50 ár, svarandi til 2% p.a. Grundstykkir verða ikki avskrivað.

Hækkingar í endurmetta virðinum á domicilognum verður beinleiðis ført yvir eginkapitalin, uttan so at hækkingin svarar til eina lækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin.

Fall í endurmetta virðinum á eini domicilogn verður tikið við í rakstrarroknskapin, uttan so at fallið svarar til eina hækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin. Í slíkum førum verður virðisfallið ført beinleiðis yvir eginkapitalin.

### Aðrar materiellar ognir

Aðrar materiellar ognir verða settar til kostprís frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður eftir linjuháttinum yvir væntaða nýtslutíð fyri ognina upp á millum 3 og 8 ár.

### Ognir, ið eru fyribils ogn

Ognir, ið eru fyribils ogn, umfata ognir, sum eru yvirtiknar frá kundamillumverandi, sum bert er ogn sparikassans fyribils, og har søla væntast innan stutta tíð, og har søla er sera sannlík.

Materiell støðisogn, sum er fyribils ogn, verður bókað til lægra virðið av roknskaparliga virðinum og dagsvirðinum frádrigið sølukostnað.

### Onnur ogn

Onnur ogn umfatar ognir, sum ikki kunnu setast undir aðrar ognarpostar. Posturin umfatar mest áogn av rentum og provisjónum og positivt marknaðarvirði av avleiddum fíggjaramboðum.

Avleidd fíggjaramboð verða roknað til dagsvirði, ímeðan aðrir postar verða roknaðir til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar undir ogn umfata goldnar kostnaðir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum.

Tíðaravmarkingar undir skuld umfata móttiknar provisjónir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum. Tíðaravmarkingar verða roknaðar til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Útgivin lánsbrøv

Útgivin lánsbrøv verða í fyrstu syftu innroknað til netto lánsupphæddina, eftir at kostnaður er trektur frá. Í aðru syftu verða tey roknað til amortiseraðan kostprís. Munurin ímillum netto lánsupphæddina og nominella virðið, verður tikið við í raksturin sum rentuútreiðslur yvir lánitíðina.

### Eftirsett kapitalinnskot

Eftirsett kapitalinnskot og hybridur kjarnukapitalur verður tikið við, tá skyldan er átikin og roknað sum móttikin upphædd, frádrigið kostnaðir í hesum sambandi.

Í seinni tíðarskeiðum verður eftirstillað kapitalinnskot roknað til amortiseraðan kostprís, svarandi til kapitaliseraða virðið roknað við grundarlagi í effektivu rentuni.

## Onnur skuld og onnur fíggjarlig ábyrgd

Onnur skuld fevnir serliga um skyldugar rentur og provisjónir, kostnaðir og negativt marknaðarvirði av avleiddum fíggjarligum tólum.

Avleidd fíggjarlig tól setast til dagsvirði, ímeðan aðrir postar setast til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Skattur

Aktuellar skattaskyldur og aktuell áogn av skatti verða í fíggjarstøðuni bókað sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, javnað fyri skatt av skattligum úrsliti frá undanfarnum árum. Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í tíðarfráviki ímillum roknskaparlig og skattlig virði av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í skattareglum og skattaásetingum, sum eru galdandi á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni.

Útsett skattaáogn verður roknað sum tann upphæddin, sum væntast at vera brúkt, til dømis við javnan av skatti av framtíðar vinningi, ella við mótrokning í útsettum skattskyldum innan somu løgfrøðisligu skattaeind.

## Avsetingar til útreiðslur

Starvsfólkaskyldur, ábyrgdir og aðrar skyldur, har stødd ella gjaldsfreist eru ókend, verður tikið við, tá tað á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni er sannlíkt, at skyldan fer at kosta sparikassanum pening, og at upphæddin fyri skylduna kann gerast upp álítandi.

Skyldur roknast eftir bestu meting yvir teir kostnaðir, sum eru neyðugir fyri at innfría skyldina. Við útrokning av avsettum skyldum verður afturdiskontering gjørd, um tað hevur týdning.

## Uppskrivingarburturleggingar

Uppskrivingarburturleggingar umfata uppskrivingar av ognum í konsernini, eftir at útsettur skattur er tikin við. Upphæddin verður upployst, tá ognin verður niðurskrivað, seld ella gongur út.

## Statsábyrgd

Sparikassin var tilknýttur skipanini fyri statsábyrgd, sum var galdandi til 30. september 2010. Ábyrgdarprovisjónin verður tikin við í rakstrarroknskapin eftir linjuháttinum yvir ábyrgdartíðarskeiðið undir aðrar rakstrarútreiðslur. Sparikassans skyldur til rindan av møguligum tapum, er ein avsett skylda, tá tað er sannlíkt, og kann hon uppgerast álítandi, verður hon roknað upp í rakstrarroknskapin undir niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m.

## Avleidd fíggjarlig tól

Avleidd fíggjarlig tól verða í fyrsta umfari tikin við í fíggjarstøðuna til kostprís og í øðrum umfari til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddum fíggjarligum tólum innganga undir aðrar ognir, ávikavist aðrar skyldur. Dagsvirðið av avleiddum fíggjarligum tólum verður uppgjørt við støði í marknaðarupplýsingum.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjarligum tólum, sum ikki hava støðu sum tryggingaramboð, verða tikin við undir virðisjavnan.

## Roknskaparlig trygd

Eingi fíggjarlig tól lúka krøvini fyri trygging av dagsvirðinum av eini ogn ella skyldu. Tær serligu roknskaparligu ásetingarnar fyri tryggingaramboð verða tí ikki nýtt.

## Segmentupplýsingar

Av tí at virksemið og marknaðirnir ikki víkja frá innanhýsis, er í roknskapinum ikki upplýst um, hvussu netto rentu- og kostnaðarinntøkur og virðisjavnan er býtt upp á virkisøkir og á landafrøðiligar marknaðir.

## Nota

3 5 ára yvirlit

| Lyklatøl | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 16,4 | 14,8 | 16,1 | 15,0 | 17,6 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,4 | 14,8 | 16,1 | 14,7 | 17,6 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | -1,0 | -28,1 | -18,3 | -21,6 | 10,3 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | -1,0 | -28,1 | -15,2 | -19,0 | 8,7 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 0,97 | 0,53 | 0,56 | 0,38 | 1,63 |
| Rentuváði | 1,5 | 2,5 | 2,0 | 1,4 | 0,5 |
| Gjaldoyrastøða | 0,3 | 0,3 | 0,0 | 1,2 | 0,2 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 107,0 | 113,6 | 100,2 | 94,9 | 108,1 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 128,3 | 218,0 | 102,4 | 156,9 | 66,5 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til basiskapital | 91,7 | 101,2 | 85,1 | 86,1 | 52,0 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 3,2 | 2,4 | 2,2 | 0,7 | 0,6 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 4,1 | 5,8 | 3,1 | 2,6 | 1,0 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í árinum | 0,7 | 2,7 | 2,1 | 2,2 | 0,0 |
| Útlánsvøkstur í árinum | -4,6 | -7,4 | -1,1 | 1,6 | 21,6 |
| Útlán í mun til eginpening | 9,3 | 9,6 | 7,8 | 6,5 | 5,4 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 72.072 | 76.953 | 67.615 | 78.876 | 83.221 |
| Virðisjavnan | -2.381 | -13.421 | -7.905 | -20.787 | 805 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | -88 | 485 | -17.845 | 130 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 548 | 785 | 1.707 | 1.126 | 2.082 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **70.239** | **64.229** | **61.902** | **41.370** | **86.238** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 57.235 | 68.769 | 58.737 | 56.110 | 52.255 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 3.491 | 3.986 | 4.571 | 7.966 | 2.550 |
| Tap og niðurskrivingar, skuldarar | 11.323 | 49.306 | 46.341 | 45.126 | -1.939 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-1.810** | **-57.832** | **-47.747** | **-67.832** | **33.372** |
| Skattur | 0 | 0 | -8.156 | -8.103 | 5.100 |
| **Ársúrslit** | **-1.810** | **-57.832** | **-39.591** | **-59.729** | **28.272** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.623.652 | 1.702.258 | 1.837.592 | 1.858.858 | 1.828.888 |
| Virðisbrøv | 264.862 | 352.096 | 245.083 | 229.884 | 259.639 |
| Innlán | 1.585.004 | 1.580.707 | 1.892.799 | 2.009.083 | 1.710.053 |
| Javni | 2.184.545 | 2.493.076 | 2.266.384 | 2.450.176 | 2.253.280 |
| Eginpeningur | 175.445 | 176.761 | 234.720 | 287.332 | 339.931 |

Samanberingstøl eru ikki tillagað broytingum í nýttum roknskaparhátti fyri árini 2007-2008.

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 4 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 1.917 | 468 |
| | Útlán | 110.176 | 116.688 |
| | Lánsbrøv | 4.630 | 9.629 |
| | Fíggjarlig tól | 5 | 20 |
| | Aðrar rentuinntøkur | 16 | 394 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **116.744** | **127.199** |
| | | | |
| 5 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 208 | 750 |
| | Innlán | 28.220 | 39.094 |
| | Útgivin lánsbrøv í samband við Bankapakka II | 13.924 | 6.303 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot í samband við Bankapakka II | 5.822 | 5.709 |
| | Ábyrgdarpeningur | 248 | 202 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 2.016 | 1.906 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **50.438** | **53.964** |
| | | | |
| 6 | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 79 | 123 |
| | Gjaldstænastur | 1.966 | 1.717 |
| | Lánisakskostnaður | 1.543 | 1.380 |
| | Provisjón av ábyrgdum | 647 | 759 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisjónsinntøkur | 2.024 | 556 |
| | **Tilsamans** | **6.259** | **4.535** |
| | | | |
| 7 | **Virðisjavnan** | | |
| | Útgivin lánsbrøv | -300 | 0 |
| | Lánsbrøv | -391 | -2.546 |
| | Partabrøv | 4.353 | -7.334 |
| | Íløguognir | 189 | -2.576 |
| | Gjaldoyra | 79 | -34 |
| | Fíggjarlig tól | -6.311 | -931 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-2.381** | **-13.421** |
| | | | |
| 8 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.895 | 4.410 |
| | Nevnd | 600 | 600 |
| | Umboðsráð | 148 | 225 |
| | **Tilsamans** | **2.643** | **5.235** |
| | | | |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 20.654 | 16.882 |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 8 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting (framhald) | | |
| | Eftirløn | 2.837 | 3.046 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 3.085 | 3.205 |
| | **Tilsamans** | **26.576** | **23.133** |
| | | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 28.017 | 35.196 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **57.236** | **63.564** |
| | | | |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 46,7 | 47,5 |

Sparikassin hevur ikki í roknskaparárinum veitt avriksløn ella bonus, hvørki til nevnd, stjórn ella starvsfólk. Sparikassin hevur heldur ikki undanfarin ár veitt avriksløn ella bonus, og hevur heldur ongar ætlanir um framyvir at gera tað.

Vísandi til lóg um statsligt innskot í fíggjarstovnar § 8, stk. 9 hevur sparikassin í útroknan og uppgerð av skattskyldugu inntøkuni bert frádrigið helmingin av samsýningini til stjórnina, ella tkr. 948.

| | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| | **Útreiðslur til grannskoðan** | | |
| | Samlað samsýning til tey umboðsráðsvaldu grannskoðaravirkini, ið fremja lógarkravdu grannskoðanina | 1.476 | 1.119 |
| | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 450 | 400 |

Norðoya Sparikassi hevur ikki innanhýsis grannskoðan.

| | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| 9 | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 203 | 244 |
| | Maskinur og innbúgv | 3.288 | 3.742 |
| | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **3.491** | **3.986** |
| | | | |
| 10 | **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | |
| | Provisjón til Det Private Beredskab vegna Bankapakka I o.a. | 0 | 5.205 |
| | | | |
| | **Aðrar rakstrarútreiðslur tilsamans** | **0** | **5.205** |
| | | | |
| 11 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | |
| | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 90.094 | 56.464 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán í árinum | 35.154 | 45.936 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -22.997 | -3.160 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | -42.964 | -9.146 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar upp á útlán við ársenda** | **59.287** | **90.094** |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 11 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. (framhald)** | | |
| | Niðurskrivað útlán í alt, áðrenn niðurskrivingar | 190.789 | 287.864 |
| | Individuellar niðurskrivingar íalt | 59.287 | 90.094 |
| | **Niðurskrivað útlán íalt, eftir niðurskrivingar** | **131.502** | **197.770** |
| | | | |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 3.046 | 2.396 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán í árinum | 5.427 | 937 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -3.659 | -287 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar upp á útlán við ársenda** | **4.814** | **3.046** |
| | | | |
| | Niðurskrivað útlán í alt, áðrenn niðurskrivingar | 1.511.520 | 2.082.199 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar íalt | 4.814 | 3.046 |
| | **Niðurskrivað útlán íalt, eftir niðurskrivingar** | **1.506.706** | **2.079.153** |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **64.101** | **93.140** |
| | | | |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 695 | 1.396 |
| | Afturførdar burturleggingar | -695 | -701 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársenda** | **0** | **695** |
| | | | |
| | **Burturleggingar upp á Det Private Beredskab og Amagerbanken** | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar við ársbyrjan | 12.634 | 5.535 |
| | Burturleggingar í árinum | 0 | 7.099 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | -12.634 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar við ársenda** | **0** | **12.634** |
| | | | |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar við ársenda** | **0** | **13.329** |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **64.101** | **106.469** |
| | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | 12.158 | 42.776 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | -695 | -701 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | 1.769 | 649 |
| | Burturleggingar upp á Det Private Beredskab og Amagerbanken | 0 | 7.099 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -4.392 | -6.516 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivað | 3.526 | 2.429 |
| | Inngoldið til áður avskrivað krøv | -1.043 | -154 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 0 | 3.724 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin í árinum** | **11.323** | **49.306** |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 0 | 0 |
| | Broyting av útsettum skatti | 0 | 0 |
| | Javnan av roknaðum skatti | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **0** | **0** |
| | | | |
| | Samlað hall | 167.149 | 165.339 |
| | Roknaður skattur | 18,00 % | 18,00 % |
| | Roknaður skattur av halli | 30.087 | 29.761 |
| | **Útsett skattaáogn** | **16.215** | **16.202** |

Leiðslan hevur mett, at virðið av skattliga hallinum í árinum er 0 kr., av tí at tað er ósannlíkt, at sparikassin fer at fáa fíggjarligan vinning av hesum. Virðið á skattaáognini er grundað á eina meting.

| Nota | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| 13 | **Ogn hjá fíggjarstovnum og tjóðbankum** | | |
| | Uttan uppsøgn | 11.160 | 36.595 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 149.991 | 58 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **161.151** | **36.653** |
| | | | |
| 14 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 196 | 138 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 72.247 | 100.565 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 114.567 | 102.487 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 372.242 | 384.118 |
| | Yvir 5 ár | 1.064.400 | 1.114.950 |
| | **Útlán tilsamans** | **1.623.652** | **1.702.258** |
| | | | |
| 15 | **Lánsbrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagsvirði | 10.242 | 74.959 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 242.215 | 246.149 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **252.457** | **321.108** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 1.176 | -222 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **253.633** | **320.886** |
| | | | |
| 16 | **Partabrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum | 0 | 0 |
| | Onnur partabrøv | 11.396 | 30.988 |
| | **Partabrøv tilsamans** | **11.396** | **30.988** |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 17 | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Samlaður keypsprísur við ársbyrjan | 2.461 | 2.461 |
| | | | |
| | Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -1.453 | -1.474 |
| | Úrslit av kapitalpartum | 0 | 21 |
| | **Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársenda** | **1.453** | **-1.453** |
| | | | |
| | **Bókað virði við ársenda** | **1.008** | **1.008** |

| | Úrslit | Eginogn | Ognarpartur | Eginognarpartur |
|---|---|---|---|---|
| | 2010<br>1.000 DKK | 31.12.10<br>1.000 DKK | | |
| **Assosieraðar fyritøkur** | | | | |
| Partur av eginpeningi | | | | |
| Sp/f KÍ-høllin | 43 | 2.031 | 50% | 1.008 |
| Sp/f Ognarfelagið Saltangará | -2.454 | 2.359 | 49% | 0 |

Sp/f KÍ-høllin, fastognarfelag, eigur og rekur ítróttarhøll

Sp/f Ognarfelagið Saltangará, fastognarfelag, eigur og rekur handils- og skrivstovubygning

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Millumverandi við assosieraðar fyritøkur** | | |
| Útlán | 19.773 | 63.182 |
| **Ogn tilsamans** | **19.773** | **63.182** |
| | | |
| Skuld til lánistovnar | 0 | 0 |
| Áogn í Norðoya Sparikassa | 100 | 18 |
| **Skuld tilsamans** | **100** | **18** |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 18 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | **Íløgurognir** | | |
| | Dagsvirði við ársbyrjan | 17.069 | 19.644 |
| | Tilgongd | 4.386 | 0 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | Aðrar broytingar í árinum | 189 | -2.575 |
| | **Dagsvirði við ársenda** | **21.644** | **17.069** |
| | **Ognir til egnu nýtslu** | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan | 21.673 | 21.916 |
| | Frágongd | -2.548 | 0 |
| | Av- og niðurskrivingar í árinum | 203 | 271 |
| | Broytingar til endurmett virði | 0 | 28 |
| | **Útveganarvirði við ársenda** | **18.922** | **21.673** |
| | **Bókað virði av føstum ognum við ársenda** | **40.566** | **38.742** |
| | Virðisáseting er gjørd av innanhýsis metingarfólki | | |
| | **Maskinur, innbúgv o.a.** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 41.109 | 40.866 |
| | Tilgongd | 343 | 243 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **41.452** | **41.109** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 26.195 | 22.452 |
| | Avskrivingar í árinum | 3.288 | 3.743 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **29.483** | **26.195** |
| | **Bókað virði av maskinum, innbúgv o.a. við ársenda** | **11.969** | **14.914** |
| 19 | **Útsett skattaáogn** | **16.215** | **16.202** |
| | Útsett skattaáogn stavar mest frá skattaligum undirskoti | | |
| 20 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 2.761 | 2.365 |
| | Aðrar ognir | 3.913 | 3.303 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **6.674** | **5.668** |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 21 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | Skuld til tjóðbankar | 0 | 0 |
| | Skuld til peningastovnar | 80 | 76 |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar tilsamans** | **80** | **76** |
| | | | |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 80 | 76 |
| | | | |
| 22 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 717.569 | 750.926 |
| | Við uppsøgn | 377.238 | 263.734 |
| | Tíðarinnskot | 349.688 | 408.243 |
| | Serinnlán | 140.509 | 157.804 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.585.004** | **1.580.707** |
| | | | |
| | **Innlán eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 717.569 | 604.587 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 125.753 | 121.579 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 391.479 | 374.329 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 189.836 | 377.059 |
| | Yvir 5 ár | 160.367 | 103.153 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.585.004** | **1.580.707** |
| | | | |
| 23 | **Útgivin lánsbrøv** | | |
| | Lánsbrøv við statsveðhaldi | 350.000 | 650.000 |
| | Kostnaður | -157 | -487 |
| | **Útgivin lánsbrøv íalt** | **349.843** | **649.513** |

Tann 28. juni 2010 tók sparikassin lán upp á 650 mió. kr. Rentan er 3 mánaðar cibor við ískoyti upp á 0,25% p.a. Rentukostnaður fyri statsveðhaldið er 0,95% p.a. Lánið fellur til gjaldingar í seinasta lagi 28. juni 2013, men tað ber eisini til at gjalda tað aftur áðrenn tíðina.

| Nota | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| 24 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | | |
| | Hybridur kjarnukapitalur frá danska statinum | 50.591 | 50.591 |
| | Kostnaður | -217 | -497 |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot við ársenda** | **50.374** | **50.094** |

Hybridur kjarnukapitalur verður rentaður við 10,7321% við møguleika fyri skiftandi rentuískoyti. Kapitalurin kann afturgjaldast í tíðarskeiðinum 10.09.2012 - 09.09.2014 til kurs pari, 10.09.2014 - 09.09.2015 til kurs 105 og eftir hetta til kurs 110.

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 25 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.635 | 6.763 |
| | Broytingar, netto | 494 | -128 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **7.129** | **6.635** |
| | | | |
| 26 | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan** | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 7.398 | 7.441 |
| | Aðrar skyldir | 37.151 | 28.365 |
| | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan tilsamans** | **44.549** | **35.806** |

Sparikassin er partur av einum trætumáli í sambandi við eitt arbeiði, ið arbeiðstakari hevur gjørt fyri sparikassan. Sparikassin metir seg ikki at eiga at gjalda hesa upphædd. Men tað hvílir á sparikassanum ein ávísur prosessváði í hesum máli, um tað endar við at verða avgjørt á rættsligan hátt, tó í mesta lagi uml. 1 mió. kr.

Sparikassin er eisini bundin av leigusáttmálum og stuðulssáttmálum, sum tilsamans er 1.478 tkr. fyri alt árið 2012.

27 **Ognir settar sum trygd**

Sparikassin hevur pr. 31. desember 2011 ikki veitt nakra ogn sum trygd.

28 **Ognarviðurskifti**

Norðoya Sparikassi er ábyrgdarsparikassi, og er ongin ánari av peningaogn ella avlopi sparikassans. Sparikassin hevur yvir 2000 ábyrgdarar, sum 4. hvørt ár velja eitt umboðsráð, ið telur 39 limir.

29 **Nærstandandi partar**

Nærstandandi partar hjá Norðoya Sparikassa eru:

Nevndar- og stjórnarlimir
Assosieraðar fyritøkur

Allar avtalur millum nærstandandi partar og Norðoya Sparikassa eru gjørdar til marknaðartreytir.

Avtalur við nevndar- og stjórnarlimir umfata bert vanliga løn, meðan engagement við nevndar- og stjórnarlimir framganga av notu 30.

Avtalur við assosieraðar fyritøkur umfata vanligan rakstur. Millumverandi við assosieraðar fyritøkur framganga av notu 17.

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 30 | **Nevnd og stjórn** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans ella nærstandandi hjá hesum. | | |
| | Stjórn, rentustig 5,95% - 9,50% | 1.931 | 1.974 |
| | Nevnd íroknað starvsfólkavald, rentustig 5,95% - 9,50% | 4.530 | 3.209 |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 2.265 | 2.555 |
| | Nevnd | 6.387 | 5.566 |
| | Vísandi til kunngerð um fíggjarligar frágreiðingar frá kredittstovnum § 119, stk. 4, hevur sparikassin valt ikki at gera hesar upplýsingar upp fyri umboðsráðið. | | |
| 31 | **Kredittváðar** | | |
| | **Almennir myndugleikar** | **0%** | **0%** |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 4% | 5% |
| | Framleiðsluvinna | 4% | 4% |
| | Byggivinna | 3% | 4% |
| | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 10% | 12% |
| | Flutningur | 1% | 0% |
| | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 3% | 1% |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 6% | 6% |
| | Aðrar vinnur | 5% | 6% |
| | **Vinnur tilsamans** | **36%** | **38%** |
| | **Privat** | **64%** | **62%** |
| | **Tilsamans** | **100%** | **100%** |

**Vinnugreinamiðsavnan**

Sparikassin hevur í kredittpolitikki sínum ásett at vinnulán kunnu vera upp til 40% av kredittváða sparikassans. Vinnuligi parturin fall frá 38 til 36% í 2011. Eisini er í kredittpolitikkinum ásett hámørk fyri hvussu stórur partur av kredittváða sparikassans kann vera í hvørji vinnugrein.

Sparikassin metir, at vinnulán sparikassans hava eina hóskandi spjaðing á vinnugreinar.

Vinnugreinin, sum sparikassin hevur mest kredittváða í er handil, matstovu- og gistingarhúsvinnan, sum stendur fyri 10%. Hendan vinna kann vera ávirkað av negativari gongd í tøka peninginum eftir skatt hjá húsarhaldunum.

Sparikassin metir fiskivinnuna vera mest váðamiklu vinnuna, av teimum vinnum, sum sparikassin fíggjar. Sparikassans váði í hesi vinnu er tó lítil og alsamt minkandi.

Nota

31 **Kredittváðar (framhald)**

Fíggingar, sum sparikassin hevur veitt í samband við handil- og umsitan av fastari ogn, svara til 6% av kredittváða sparikassans. Sparikassin metir at virðið av føstum ognum yvirhøvur fer ikki er hækka næstu árini. Virðið kann ávirkast negativt av m.a. møguligum hækkingum í rentustøðinum og minkandi virksemi.

**Landafrøðilig spjaðing**

Í dag er uml. helmingurin av útlánunum í sparikassanum frá upprunaliga virkisøki sparikassans í Norðoyggjum og hin helmingurin í teimum økjunum, sum deildir sparikassans í Saltangará og Tórshavn fevna um. Sparikassin metir, at landafrøðiliga spjaðingin av útlánum sparikassans er umboðandi fyri landið, og tí ikki er at rokna sum ein serligur váði. Hinvegin ásannar sparikassin, at føroyski búskapurin er merktur av størri sveiggjum, enn størri búskapir, sum byggja á meiri fjøltáttaða framleiðslu, og at tað kann roknast at síggjast aftur í fíggjargeiranum.

**Stór engagement, sum eru størri enn 10% av basiskapitalinum**

Sparikassin hevur nøkur engagement, sum eru 10% ella meira av basiskapitalinum. Summurin av stórum engagementum var tann 31.12.2011 íalt 91,7% av basiskapitali sparikassans svarandi til 192 mió. kr. Hetta er munandi minni enn markið í eftirlitisdiamantinum hjá Fíggjareftirlitinum, sum er 125%. Sparikassin væntar at einstøk engagement fara niður um 10%-markið í 2012.

Av stóru engagementunum er 18,9% blanko sambært trygdaruppgerðum sparikassans, har trygdarvirðini eru ásett varisliga. Umferðarfæ verður ikki roknað sum trygd í hesum sambandi.

**50 tey størstu engagement sparikassans**

Hesi engagement (íroknað tey sum eru størri enn 10% av basiskapitalinum, sum eru viðgjørd omanfyri) eru íalt 568 mió. kr. svarandi til 33,9% av sparikassans útlánum áðrenn niðurskrivingar. Av hesum engagementum eru 104,6 mió. kr. svarandi til 18,4% niðurskrivingarengagement, og eru íalt 22 mió. kr. av nevndu upphædd niðurskrivað.

Sparikassin bólkar øll útlán í bonitetsbólkar samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Bólkarnir eru hesir: Bólkur "3" eru kundar við góðum boniteti, "2a" eru kundar við vanligum boniteti, "2b" eru kundar við eitt sindur verri boniteti, "2c" eru kundar við munandi verri boniteti og "1" eru niðurskrivingarkundar.

Av engagementunum við 50 teir størstu kundarnar eru 71,8 mió. kr. "2c"-kundar, har vandi er fyri niðurskriving, um fíggjarliga gongdin verður verri. Restin er býtt soleiðis, at 180,7 mió. kr. eru "2b" meðan 210,9 mió. kr. eru annaðhvørt "2a" ella "3". Hesir bonitetsbólkar hava avmarkaðan váða.

**Privatkundar**

Privatkundar eru 64% av kredittváða sparikassans. Váði sparikassans frá privatengagementum avspeglar búskaparligu gongdina í landinum, herundir gongdini í tøka peninginum eftir skatt hjá húsarhaldunum og prísgongdini á húsamarknaðinum.

Útlán sparikassans til privat hevur hetta bonitetsbýti:

| | |
|---|---|
| 3 og 2a | 46% |
| 2b | 34% |
| 2c | 12% |
| 1 | 8% |

Sparikassin endurmetir reguliga ásetingina av boniteti. Sparikassin avsetur orku burturav at viðgera veik engagement herundir serliga engagement við boniteti "2c" og "1", hetta fyri at fyribyrgja størri niðurskrivingum og avskrivingum.

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 32 | **Marknaðarváðar** | | |
| | **Gjaldoyraváði** | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 731 | 648 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 0 | 0 |
| | **Gjaldoyraábending** | **731** | **648** |
| | Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,3% | 0,3% |
| 33 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | 3.241 | 5.266 |

# Nevnd og stjórn

## Nevnd

John Petur Danielsen, cand.polit.
Argir. Føddur 1949.
(nevndarformaður)
Innkomin í nevndina í 2009 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 136
Onnur leiðslustørv: einki

Jóannes Hansen, studentaskúlalærari
Toftir. Føddur 1955.
(næstformaður)
Innkomin í nevndina í 2007 og stendur fyri vali í 2013
Nevndarsamsýning: tkr. 82
Onnur leiðslustørv: einki

Finn Kjølbro, bókhaldari
Klaksvík. Føddur 1941.
Innkomin í nevndina í 1994 og farin úr nevndini í 2011
Nevndarsamsýning: tkr. 18
Onnur leiðslustørv: einki

Erling Petersen, bókhaldari
Klaksvík. Føddur 1956.
Innkomin í nevndina í 2000 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: JFK P/f, nevndarlimur
og Atlantic Fishing P/f, nevndarlimur

Jóhanna á Tjaldrafløtti, skúlastjóri
Klaksvík. Fødd 1962.
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2014
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: Lætt & Leskiligt Sp/f, stjóri

Kristian Martin Rasmussen, reiðari
Klaksvík. Føddur 1947.
Innkomin í nevndina í 2010 og stendur fyri vali í 2013
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: Palli hjá Mariannu P/f, nevndarformaður,
Hvalnes P/f, nevndarformaður,
Christian í Grótinum P/f, nevndarformaður,
Eystfelli P/f, nevndarlimur

Karl Heri Joensen, grótlaðari
Klaksvík. Føddur 1955.
Innkomin í nevndina í 2011 og stendur fyri vali í 2014
Nevndarsamsýning: tkr. 36
Onnur leiðslustørv: KHJ Nýgerð Sp/f, stjóri

Julianna Thomsen, deildarleiðari
Klaksvík. Fødd 1959.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2006 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: einki

Guðrið Lava Olsen, vinnukundaráðgevi
Leirvík. Fødd 1962.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: einki

Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðari
Klaksvík. Føddur 1957.
Starvsfólkavaldur
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2012
Nevndarsamsýning: tkr. 55
Onnur leiðslustørv: einki

## Stjórn

Marner Mortensen, stjóri
Klaksvík. Føddur 1963.
Innkomin sum stjóri 12.03.2010
Onnur leiðslustørv: Elektron, nevndarlimur

# Umboðsráð

| | | | |
|---|---|---|---|
| ABSALON Í BUÐ | FO-740 HVANNASUND | JÓGVAN JOENSEN | FO-798 TRØLLANES |
| ALEXANDUR JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK | JÓHANNA Á TJALDRAFLØTTI | FO-700 KLAKSVÍK |
| ÁLVUR KLAKK | FO-700 KLAKSVÍK | JÓHANNA CHRISTIANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ANDREAS JOSEPHSEN | FO-700 KLAKSVÍK | KALLI VÁÐKLETT | FO-700 KLAKSVÍK |
| BERGUR Á REYNATRØÐ | FO-620 RUNAVÍK | KARL HERI JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| DEBES CHRISTIANSEN | FO-730 NORÐDEPIL | KÁRI KLETTSKARÐ Í KONGSSTOVU | FO-785 HARALDSSUND |
| ERLING PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK | KJARTAN HANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| EYÐÁLVUR M. JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN | KRISTIAN MARTIN RASMUSSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| FINN KJØLBRO | FO-700 KLAKSVÍK | MARKUS TUMMAS JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| FINNUR SIVERTSEN | FO-700 KLAKSVÍK | MORTAN JOHANNESEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| GULLAK GULLAKSEN | FO-767 HATTARVÍK | MUNDA LANGAARD | FO-520 LEIRVÍK |
| HANS JÁKUP KALLSBERG | FO-750 VIÐAREIÐI | NIELS V. PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HANS JOSEPHSEN | FO-700 KLAKSVÍK | NIKOLAS S. OLSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HEINI ÓSÁ | FO-700 KLAKSVÍK | OLIVUR THOMSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HERGERÐ ZISKASON | FO-700 KLAKSVÍK | PEDER T. HAAHR | FO-416 SIGNABØUR |
| HILMAR KALSØ DANIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK | SÁMAL PETUR LERVIG | FO-480 SKÁLI |
| JÁKUP J. PETERSEN | FO-750 VIÐAREIÐI | SIGGVARD JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| JOHN P. DANIELSEN | FO-160 ARGIR | SØREN ZISKA JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓANNES HANSEN | FO-650 TOFTIR | VICTOR NIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓGVAN EDMUND Á GEILINI | FO-765 SVÍNOY | | |

www.ns.fo